

# SLAGKRAFTIN HJÁ LØKKE TRÝSTIR NÚ ANDSTØÐUNA

**FLESTU** POLITISKU **VIÐMERKJARARNIR** HØVDU AVSKRIVAÐ **LARS LØKKE RASMUSSEN** SUM SIGURSHARRA Á **FÓLKATINGSVALINUM** Í ÁR. **MEN** TÁ HANN Á **NÝGGJÁRINUM BOÐAÐI** FRÁ, AT **EFTIRLØNIN** SKAL **AVTAKAST**, VÍSTI HANN, AT HANN ER EIN **ÓTTALEYSUR** POLITISKUR **LEIÐARI**, IÐ TORIR AT TAKA **UMSTRÍDDAR** AVGERÐIR. FÆR HANN **HÁÐ** ELLA **LØN** FYRI SÍNA NÓGV **UMRØDDU** ÆTLAN? SKUMPAR **HELLE THORNING-SMITH** SITANDI **STJÓRN** TIL VIKS, TÍ DANSKARAR ERU **DEYÐATROYTTIR** AV BORGARLIGU **LEIÐSLUNI** SEINASTU **10 ÁRINI**? SPENNINGURIN ER **ØKTUR** MUNANDI SÍÐAN **1. JANUAR**



**FÓLKATINGSVAL**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Hann hevur nærum bara havt trupulleikar, síðan hann tók við forsætisráðharrasessinum eftir Anders Fogh Rasmussen í 2008.

Lyklarnir til forsætismálaráðið vóru neyvan handaðir honum, so skolaði ein altjóða fíggjarkreppa inn yvir Danmark, og bankar fullu sum flugur. Stjórnin pjøssaði saman tveir bankapakkar at standa ímóti ringasta uppganginum, og í fjølmiðlunum hoyrdist mest um húsagangir, rapaðar fastognarmarknaðir og arbeiðsloysi.

Lars Løkke Rasmussen kom til alt annað enn skorin klæðir í forsætismálaráðnum, og oman á búskaparligu trupulleikarnar fekk hann harða viðferð í summum fjølmiðlum. Litrik bløð vildu vera við, at honum dámdi serstakliga væl tað søta lívið, og almannakunngjørdu myndir av manninum, meðan hann drakk øl í veitslulag.

At drekka øl hevur ongantíð verið óvanligt í Danmark, men kortini kundi nýggi forætisráðharrin tykjast í so menniskjaligur, tí avmáldi stílurin hjá Anders Fogh Rasmussen var nærum ómenniskjaligur.

> *Eftirlønin skal avtakast, tí hon kostar statinum ov nógv og skundar undir, at fólk arbeiða ov stutt. Í meðal arbeiða danskarar bara, til teir eru 61 ár, men tá eru nógv fólk hvørki gomul ella slitin*

Hvussu Lars Løkke Rasmussen man vera, fáa veljararnir høvi at siga sína hugsan um, men ein keisari í ongum klæðum er hann so ikki. Politisku mótstøðufólk hansara hava fleiri ferðir sagt, at hann er ein dugnaligur politiskur handverkari.

Hann kann gamaní tykjast rísin viðhvørt og eisini hástórur, men tað kemst ikki av, at hann ikki veit, hvat hann tosar um, tvørturímóti. Hann er væl inni í flestu málunum og skilir fløktar samanhangir skjótt, og í orðaskiftum kann hann standa upp ímóti hvassastu hvirlunum og svara fyri seg.

Spurningurin higartil hevur verið, um evnini í honum vóru so fræg, at hann eisini kundi gerast ein trúverdugur statsleiðari. Seinastu tvey árini hava danskarar ivast stórliga í júst hesum, men eftir nýggjársrøðuna 1. januar, tá hann kunngjørdi, at eftirlønin skal avtakast, so staturin kann spara 16 mia. kr. í eini hóttandi kreppútíð, er hann nógv róstur fyri at hava bæði dirvi og slagkraft. Alt fleiri danskarar halda, at Lars Løkke veruliga er førur fyri at stýra donsku skútuni gjøgnum fíggjarligu brotasjógvarnar.

### Uppgerð í sjónvarpi

Skandinavisku samfeløgini eru tiltikin fyri at tryggja vælferðina hjá tí einstaka so væl, sum tað yvirhøvur ber til. Av tí sama er skattatrýstið í skandinavisku londunum eisini ovurstórt. Í einum landi sum Danmark, har vælferðarmodellið er so nógv hálovað, er tað nærum halgibrot at skjóta upp at taka rættindi frá fólki. Tað vanliga er jú at geva veljarunum lyfti um fleiri rættindi.

Men hetta var so tað, sum Lars Løkke Rasmussen boðaði frá, at stjórnin fer at gera. Eftirlønin skal avtakast, tí hon kostar statinum ov nógv og skundar undir, at fólk arbeiða ov stutt. Í meðal arbeiða danskarar bara, til teir eru 61 ár, men tá eru nógv fólk hvørki gomul ella slitin, og tí kunnu tey væl arbeiða longri, segði Lars Løkke Rasmussen.

Við hesi fráboðanini trýsti hann Helle Thorning-Smith í verjustøðu eina løtu, og fyrsta styrkiroyndin teirra millum eftir fráboðanina var longu 2. januar, tá tey bæði dystaðust ein heilan tíma í sjónvarpsstovuni hjá DR.

Tílíkir dystir eru altíð spennandi,